

*G.g. Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!*

# Arbeiði og ættarlið (heimarbeiði)

Nemingabókin, síða 61-62

Førleikar:

- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Hvør nemingur fer heim til síni foreldur og kannar hvørjum foreldrini, ommur/abbar og langommur/-abbar arbeiddu við og hvar tey búðu. Úrslitið verður skrivað í talvuna niðanfyri.

Síðani telja tit øll skjølini upp og seta upp í stabbamyndir, hvat tey trý ættarliðini arbeiddu við. Til ber at deila arbeiðini upp í tilfeingis-, framleiðslu- og tænastuvinnur (síða 61). Tey, ið hava verið heimagangandi ella uttan arbeiði, fáa sín egna stabba. Samanberið síðani býtið millum ættarlið. Hvørjar broytingar eru hendar? Hví eru hesar broytingar hendar?

Tosið eisini um hvussu størv eru gingin í arv frá ættarliði til ættarlið ella um ávís størv kunnu setast í samband við ávísar bygdir/øki.

<table>
<tr><td colspan="4">Mamma</td><td colspan="4">Pápi</td></tr>
<tr><td colspan="2">Omma</td><td colspan="2">Abbi</td><td colspan="2">Omma</td><td colspan="2">Abbi</td></tr>
<tr><td>Langomma</td><td>Langabbi</td><td>Langomma</td><td>Langabbi</td><td>Langomma</td><td>Langabbi</td><td>Langomma</td><td>Langabbi</td></tr>
</table>